# Sauer-Danfoss sigur 330 upp

Danska oljutrýstverksmiðjan Sauer-Danfoss í Suðurjyllandi kunngjørdi í dag, at hon hevði gjørt av at siga 330 medarbeiðarum úr starvi. Talan er um 270 tímalønt og 60 fastlønt. Hetta er aðru ferð í ár, at Sauer Danfoss sigur fólki upp. Fyrru ferð var í januar, tá 400 fólk mistu arbeiðið. Leiðslan sigur, at fíggjarkreppan hevur rakt virksemið meint, og at einki bendir á nakran bata fyrr enn eina ferð í 2010. Tær nógvu uppsagnirnar hjá Sauer Danfoss hava rakt lokalsamfelagið í Suðurjyllandi sera meint, skrivar JydskeVestkysten.

SAUER DANFOSS

sama mun, sum undirsjóvartunnilin, er spurningurin um kommunusamanlegging. Og har hevur borgarstjórin í Skopun sína heilt greiðu meining.

– Nei, har er eingin ivi um, at tá tú spyr meg handan spurningin, og eg svari tær heilt erliga, so trúgvi eg nokk, at tey bygdaráðini, sum sita nú, eru tey seinastu undir hesari skipanini. Eg rokni við, at tá val verður aftur um hálvtfjórða ár vænti eg, at kommunurnar hava lagt saman, sigur Gerhard Lognberg.

Hann vísir tó samstundis á, at sjálvt um øll Sandoyggin verður løgd saman í eina kommunu, so fáa tey framvegis bert eina eind, sum svarar til eitt nú Fuglafjarðar kommunu.

– Sandoyggin verður einki øðrvísi enn Fuglafjørður sum kommuna, so í mínari verð haldi eg, at Sandoyggin átti at lagt saman við Havnini, tí so vóru vit komnir í eitt størri øki. At leggja Sandoynna saman úr hesum fýra kommununum í eina kommunu, sum telur 1300 fólk, sigur mær ikki so ógvuliga nógv, sigur Gerhard Lognberg.

Sandoyggin verður sostatt ein ov lítil eind sum einsamøll kommuna.

– Sjálvandi. Sandoyggin megnar ikki at bera alt. Tú má sum borgari á Sandoynni hava somu krøv sum aðrir borgarar í landinum, og vit sum kommuna við 1300 borgarum koma ongantíð at megna at lyfta ta byrðuna einsamøll, sigur Gerhard Lognberg.

Kemur undirsjóvartunnilin, og íbúgvaratalið verður tað tvífalda, verður støðan kanska øðrvísi.

– Men sum støðan er í løtuni, hava vit ikki møguleika at gera tað sama, sum onnur støð í Føroyum. Tá verður Sandoyggin verri fyri. Vit kunnu til dømis taka spurningin um eina ítróttahøll. Sandoyggin eigur onga ítróttahøll, tað sær kanska eitt sindur ljósari út við tí, men í løtuni hava vit onga, og tað haldi eg er ov vánaligt, at ein oyggj sum Sandoyggin ikki kann bjóða sínum ungu eina ítróttahøll, sigur Gerhard Lognberg.

### Standa saman

Men hóast tað ikki verður byrjað upp á Sandoyartunnilin fyrr enn í fyrsta lagi í 2011, so hevur Skopun kortini 60 børn í barnagarðinum, og fólk hava ikki mist áræði at seta føtur undir egið borð.

– Ja, eg síggi nú ikki so svart upp á framtíðina. Tað verður bygt her í Skopun, hóast fleiri hava sagt grundstykkini frá sær aftur. Tvey grundstykki eru planerað og eini hús standa í gerð, so jú tað verður bygt, sigur Gerhard Lognberg.

– Sum eg nevndi í áni, so verða hetta allarhelst síðstu bygdaráðini, sum sita undir hesari skipanini. Eg trúgvi, at tá vit koma til næsta kommunuval, verða kommunurnar lagdar saman. Men sjálvt um vit verða løgd saman í eina kommunu, verða vit kortini bert ein lítil kommuna í mun til aðrar kommunur, sigur borgarstjórin í Skopun.

Hann er, eins og onkur undan honum, bæði lands- og kommunupolitikari, og tað sær hann ongar trupulleikar við.

– Eg haldi sjálvur, at tað er ein góð kombinatión at vera bæði. Tú kanst náa langt, men tað kann eisini vera stríggið og kann slíta nógv upp á teg, men eg trúgvi kortini, at tað er gott á mangar mátar, at tú kanst vera í báðum støðunum. Eg haldi, at tað er pláss fyri tí, men tað liggur eisini nógv arbeiði í tí, sigur Gerhard Lognberg.

Kemur tað hartil, at talan verður um eina kommunu, og verður borgarstjórin í Skopun valdur inn í nýggju kommununa, ætlar hann sær at arbeiða líka hart fyri einari Sandoyarkommunu, sum hann higartil hevur gjørt fyri Skopunar kommunu.

– Ja, tað kann eg lova tær, at tað fari eg at gera. Sandoyggin er so mikið lítil, at tað er bara eitt hjá okkum at gera, og tað er at standa saman sum ein maður, og tað er tað, vit vinna við. Tað einasta vit kunnu gera er at standa saman og lyfta í felag, sigur Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopunar Kommunu.




